Tjóðskjalasavnið

# FRÁBOÐAN AV GRANSKINGARDÁTUM

Tjóðskjalasavnið tekur ímóti granskingardátum bæði frá almennum og privatum granskingarverkætlanum. Dáturnar skulu fráboðast, tá ið liðugt er at savn tær inn. Fráboðanin kann vera á føroyskum ella enskum.

## Mannagongd

- Fyll oyðublaðið út (sí niðanfyri) og send skjalafesting av skipanini við.
- Dáturnar skulu fráboðast, tá ið liðugt er at savn upplýsingarnar inn.
- Fráboðanin kann vera á føroyskum ella enskum
- Tjóðskjalasavnið váttar fyri móttøku við at senda eina kvittan
- Um okkurt er ógreitt í fráboðanini, ella nærri frágreiðing er neyðug, setir Tjóðskjalasavnið seg í samband við sendaran
- Tjóðskjalasavnið ger av, um dáturnar skulu avhendast í eini skjalasavnsútgávu og setir seg í samband við granskaran ella annað kontaktfólk við nærri kunning um avhendingarmannagongd o.a.

## FAIR

FAIR meginreglurnar eru nøkur tilmæli um, hvussu ein kann styrkja og ríka sínar dátur við metadátum. Tess meira granskarar gera sínar dátur FAIR, tess lættari verður at finna aftur og endurnýta tær í einum størri høpi, eisini í framtíðini. Lesið meira um FAIR-meginreglurnar og langtíðarvarðveiting.

V. U. Hammershaimbsgøta 18, FO-100 Tórshavn, Tel. + 298 340 540, T-postur: skjalasavn@skjalasavn.fo